# Tey ungu vilja hava dansin aftur til Havnar

**Dansurin í Badmintonhøllini er nú steðgaður. Fyrireikararnir fingu boð um, at dansurin skuldi enda klokkan tvey, og úrslitið av hesum gjørdist, at mett varð, at grundarlag var ikki fyri at hava dans í Badmintonhøllini. Nú eru tey ungu farin at mótmæla. Undirskriftir verða savnaðar saman og ein av døgunum verða tær handaðar borgarstjóranum, Jan Christiansen**



*Teir báðir Rói Bjarnason Poulsen og Tummas Hans Rubeksen, eru farnir at savna undirskriftir inn fyri at mótmæla, at onki dansistað er til ung í Havn. Higartil eru 500 undirskriftir komnar inn, og vóna teir at fáa eini 1000*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

DANSUR
*Ingrid Bjarnastein*

Fyri stuttum helt dansurin í Badmintonhøllini uppat. Hetta var einfylgja av, at fyrireikararnir høvdu fingið boð um, at dansurin skuldi enda klokkan tvey ístaðin fyri um hálvgum fýra tíðina sum vanligt. Fyrireikararnir mettu, at grundarlag var tí ikki fyri at halda fram við dansinum, tí ov fá fólk komu. Nú er dansurin strikaður, og tey ungu undir 18 í Havn hava onki dansistað, har tey kunnu fara um vikuskiftini. Og nú eru tey farin at mótmæla.

Rói Bjarnason Poulsen og Tummas Hans Rubeksen eru farnir at savna undirskriftir saman, sum teir ætla at handa borgarstjóranum, Jan Christiansen. Teir eru ávíkavist 16 og 17 ára gamlir, og teir halda, at tað er ov vánaligt, at onki stað er til tey ungu at fara um vikuskiftini. Higartil hava teir fingið um 500 undirskriftir frá næmingum í framhaldsdeildum í Havn, men teimum vantar enn at fara til fleiri skúlar.

– Vit hava ongastaðni at fara leygarkvøld. Vit ganga og mala í býnum. Kanska vit sita hjá onkrum vinmanni fyrst, og so fara vit út í býin at mala – eisini tá tað regnar. So ganga vit har til klokkan er 4-5 og so fara vit heim, siga teir báðir, Rói og Tummas Hans.

**Fanga áhugan**

– Kanska vit fara at fanga áhugan hjá býráðnum tá vit fara at handa borgarstjóranum undirskriftirnar. Vit vóna, at vit fara at fáa eini 1000 undirskriftir, siga teir báðir.

Rói og Tummas Hans halda, at tað er keðiligt, at teir noyðast at fara út á bygd til dans, tí tað kostar teimum so nógv eyka.

– Badmintonhøllin liggur væl fyri. Fólk hava vant seg við, at dansur er har. Tey siga, at tað er so nógvur kriminalitetur har uppi, men hann verður ikki steðgaður við at lata staðið aftur. So flytir hann seg bara víðari oman í býin, halda teir báðir ungu mótmælararnir.

Teir eru ikki rættliga lidnir við at savna undirskriftir saman enn. Teimum vantar framvegis ein part av Venjingarskúlanum og Eysturskúlanum, so enn er ikki greitt nær undirskriftirnar verða handaðar borgarstjóranum.

Besti norðurlendski filmurin:

# Maðurin við ongari fortíð

FILMSÝNING
*Ingrid Bjarnastein*

Mánadagin 3. februar verður besti filmurin í Norðanlondum beint nú sýndur í Norðurlandahúsinum. Filmurin eitur »Maðurin við ongari fortíð«, og fekk fyrstu filmsvirðisløn Norðurlandaráðsins í oktober. Haraftrat er hann í uppskoti til at fáa Oscar virðisløn sum besti útlendski filmur.

Filmurin er finskur, og Aki Kaurismäki hevur stjórnað. Filmurin hevur ein blues kendan farra úr stórbýarundirverðini, har tilveran, hóast avlagað og bronglað, eisini hevur glottar. Og reiðiliga tað. Í filminum verður aftur og aftur staðfest, at stjørnur glampa bert í myrkri.

Filmurin setur tey heimleysu á breddan. Hóast øll eru á tromini og bústaður er einki annað enn ein gomul bingja, so roynir hvør einstakur at halda lívinum uppi. Soleiðis er eisini við nýggja filminum, har Kaurismäki á rættan hátt hevur ein reyðan tráð av sniðfundingum, svørtum skemti.

Ein navnaleysur maður kemur við tokinum til Helsingfors. Hann verður álopin, sligin og sparkaður og missir minni. Maðurin hevur gloymt sína fortíð og er vorðin ein ikki-persónur, sum hvørki kann gerast limur í ALS, vitja bankan ella fáa almannaveiting. Umstøðurnar noyða mannin uttan minni at klára seg sjálvan. Í hesi tiltongd varnast hann nýggjar partar av lívinum. Hann fær sær ein lítlan urtagarð og finnur stóra kærleikan í køkinum hjá Frelsunarherinum.

Í oktober, tá Norðurlandaráðið rundaði tey fimmti, setti tað eisini á stovn norðurlendsku filmsvirðislønina, og var tað hesin filmur, ið fekk hana. Ein heiður, sum allir filmsummælarar tóku undir við.

Filmurin, sum nevnist »Maðurin við ongari fortíð« verður sýndur í Norðurlandahúsinum 3. februar klokkan 19.30. Filmurin er 97 minuttir og hevur enskan undirtekst.

# CISV fyllir 25

**Í sambandi við, at CISV – Altjóða barnalegur, hevur verið virkið í Føroyum í 25 ár, verður um vikuskiftið skipað fyri ymsum tiltøkum á torginum í SMS**

FØÐINGARDAGUR
*Ingrid Bjarnastein*

CISV er ein altjóða felagsskapur, sum arbeiðir fyri friði, fatan og virðing manna millum. CISV stendur fyri Childrens International Summer Villages. Felagsskapurin er óheftur bæði politiskt og átrúnarliga.

Tað var Doris Allen úr Cincinatti í USA, sum eftir seinna heimsbardaga helt, at okkurt mátti gerast fyri at skapa meira virðing fyri hvør øðrum. Hon helt, at børn og ung vóru vegurin til eina verð uttan kríggj og annan ágang á mannaættina. Í 1951 byrjaði hon at skipa fyri barnalegum fyri 11 ára gomlum børnum úr ymsum londum, við ymiskum húðaliti og mentan. Børnini uplivdu nakað nýtt, lærdu um aðrar mentanir og knýttu nýggj vinarbond. Legurnar fingu góða undirtøku og verða í dag hildnar um allan heimin á hvørjum sumri.

Í Føroyum verður CISV kallað fyri Altjóða barnalegur. Tey fyrstu fýra børnini vóru í Noregi í 1978, og síðani tá hava umleið 500 føroysk børn verið og luttikið á legum, bæði her heima og úti í verðini. Og hesi 25 árini hava føroyingar eisini verið vertir fyri fleiri legum.

Um vikuskiftið verður skipað fyri tiltøkum á torginum í SMS í sambandi við at Altjóða barnalegur hava verið virknar í Føroyum í 25 ár. Byrjað varð í gjár, hósdag, við framsýning av CISV myndum. Har eru myndir av teimum føroyskum bólkunum, sum hava luttikið á CISV legunum ígjøgnum tíðirnar. Henda framsýning verður eisini í dag, fríggjadag, og í morgin leygardag.

Ungdómsnevndin hjá CISV hevur skipað fyri eini teknikapping. Evnið er friður og kappingin er býtt upp í tríggjar aldursbólkar. Leygardagin klokkan 12 fer CISV kórið at syngja kendar CISV sangir, og ein av stigtakarunum til Altjóða barnalegur í Føroyum, Pauli Nielsen, fer at siga nøkur orð, og virðislønir verða eisini latnir fyri teknikappingina.



# Fólkaskúlin í Klaksvík raðfestast hægri



*Jórun Høgnesen, forkvinna í mentunarnevndini í Klaksvíkar Býráð avmyndað frammanfyri gamla skúla, sum hýsir Klaksvíkar Tónlistaskúla og Serskúlanum*

**– Nú skal fólkaskúlin í fokus. Tað sigur forkvinnan í mentunarnevnd Klaksvíkar býráðs, Jórun Høgnesen. Hon fílist á, at tað hevur tikið alt ov langa tíð at fáa skúlarnar upp eftir raðfestingarlistanum, men nú sær út til, at tað fer at henda nakað á økinum**

FÓLKASKÚLI
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Fólkaskúlarnir í Klaksvík hava staðið í stað í fleiri ár. Skúlin á Ziskatrøð hevur sæð út sum eitt byggipláss í fleiri ár, meðan arbeitt hevur verið við at sett hann í stand. Hin skúlin, skúlin við Ósánna hevur verið ov lítil í fleiri ár. Og tosið um útbygging er við at verða gamalt eftirhondini. Men forkvinnan í Mentunarnevndini sigur, at nú fer okkurt at henda.

– Vit hava umleið 2,3 milliónir til fyrsta byggistig av útbyggingini av Ósáskúlanum, sum umfatar nýtt fýrrúm og arbeiðsrúm til skúlatænaran og fýra nýggjar skúlastovur, greiðir Jórun Høgnesen frá.

Og arbeiðið upp á skúlan á Ziskatrøð fer í gongd aftur í summar eftir, at steðgur hevur verið í eitt ár ella gott tað.

Tað hevur verið sera tungt at fáa tær neyðugu játtaninar til skúlarnar, men forkvinnan í mentunarnevndini sigur, at nú sær út til, at meiirluti er fyri, at nú skal nakað henda. Orsøkin til, at tað hevur verið so tungt er, at íløgukarmurin er so tepur, og nógvar hart tiltrongdar íløgur eru í kommununi.

**Fólkaskúlarnir**

Skúlin við Ósánna lýkur ikki krøvini, sum fólkaskúlalógin setur. Til dømis er ongin serstova á skúlanum og heldur ongin køkur. Sum er fara næmingarnir niðan í hin skúlan, tá tey hava køk og smíð, meðan tey hava hinar lærugreinarnar í hondverk og list inni teirra vanligu skúlastovu.

Ein bólkur varð settur til at lýsa tørvin í skúlanum við Ósánna, og har varð staðfest, at tørvur er á einum 12 nýggjum skúlastovum íroknað serstovunum og køkinum.

Jórun Høgnesen sigur, at avgerð skal takast um, hvussu farast skal í gongd við Ósáskúlan.

– Vit hava tosað um at seta eina arkitektakapping út í kortið, men enn er onki endaliga avgjørt, sigur hon. Hon torir heldur ikki at siga nakað um, nær nýggi parturin av skúlanum verður klárur at taka í nýtslu, tí røddir hava eisin verið frammi um, at tað møguliga hevði verið skilagott at bíða eitt ár við at fara í gongd, tí so er tað meira av pengum at arbeiða við.

– Men tað sum eg vil er, at alt fyrireikingararbeiðið skal verða gjørt í ár í øllum førum, sigur Jórun, sum tó ikki dylir fyri, at ynskiligt hevði verið, um skúlin hevði tær fýra nýggju skúlastovurnar til komandi skúlaár.

Arbeiðið við at í standgera skúlan á Ziskatrøð gongur ikki so skjótt, fyri tað fyrsta tí, at meginparturin av innanduraarbeiðinum má gerast, meðan børnini hava frí. So fyri tað mesta hevur summarfrítíðin verið sett av til arbeiðið. Men í summarfrítíðini í fjør varð onki gjørt við skúlan, tí ongin arbeiðsmegi var til taks. Hetta varð mett at vera ein stórur brølari frá kommununi og umsitingini, men í ár er so tryggjað, at tá skúlin fer í summarfrí, tá byrjar arbeiðið bæði innan og uttan.

Hetta varð samtykt á býráðsfundi týskvøldið.

**Serskúlin**

Jórun sigur at við at útbyggja fólkaskúlarnar, so er trupulleikin við serskúlanum framvegis ikki loystur. Tann skúlin er í dag til børn við serligum tørvi, sum á ongan hátt kunnu vera í einum vanligum skúlaflokki.

Sum er eigur kommunan at byggja ein møguligan nýggjan serskúla. Og tað sigur Jórun, at hon gongur inn fyri, men hon leggur dent á, at tørvurin má nøktast og ikki bert nú, men eisini fram í tíðina. Og tí heldur hon, at tað er umráðandi at hugt verður frameftir, um ein nýggjur serskúli skal byggjast.

Men forkvinnan í mentunarnevndini heldur, at eitt betri hugskot hevði verið at bygt ein sernámsdepil við øllum, sum skal til, í Klaksvík. Hon vísir á, at miðnámsskúlar liggja úti á økjunum, og tað er við til at halda ungdómin í teirra heimstaði í eitt longri tíðarskeið.

– Hesir skúlar verða fíggjaðir av landinum, so hví ikki lata landið verða við til at fíggja skúlar til smábørn, sum hava enn størri tørv á at vera í ella so stutt frá, í tann mun tað ber til, teirra heimliga umhvørvi, spyr hon við atliti til tann ætlaða undirsjóvartunnilin um Leirvíksfjørð.

– Við einum tílíkum sernámsdepli, hevði borið til at bygt eina vitan upp, sum hevði komið øllum fólkaskúlanum tilgóðar. Og eisini íblástur til lærararnar, sum dagliga eru um hesi børnini. Og eg fari at taka upp samráðingar við landsins myndugleikar um hetta málið. Men fer tað ikki at lata seg gera, so mugu vit finna út av eini loysn sjálvi, men so verður tað ikki so umfatandi, sigur Jórun Høgnesen, sum heldur, at tað er av stórum týdningi, at foreldrini til hesi børnini fáa møguleika til at verða við í fyrireikingararbeiðinum til ein tílíkan skúla.

– Kommunan kennir ikki tørvin hjá hesum børnunum, men við at fáa foreldrini upp á tal, so áttu vit at kunna fingið eina góða lýsing av tørvinum saman við lýsingini hjá sosialu deild, sum arbeiðir við tí nú. Børn við serligum tørvi hava krav upp á eitt virðiligt tilboð sigur Jórun.

Serskúlin í dag heldur til í bygninginum, sum vanliga verður kallaður gamli skúli. Tað er í sama bygningi, sum Klaksvíkar Tónlistaskúli heldur til. Men Jórun sigur, at um eini hóskandi høli verða til taks til Tónlistaskúlan, so hevði møguleikin fyri at bygt allan gamla skúla um til ein serskúla verið til staðar – ella umvent.

– Men tað er onki avgjørt enn, men arbeitt verður við øllum hesum málunum, og eg vóni, at vit um nøkur ár kunnu síggja eitt fólkaskúlaumhvørvi, sum øll kunnu fáa gleði av, sigur Jórun og vísir at enda á, at fólkaskúlin er tann einasti stovnurin í lívinum hjá fólki har tey skulu verða, uttan at tey kunna velja, í níggju ár.